# Á landssjúkrahúsinum eru kreppuárini ikki av enn

**– Síðstu 14 árini hevur jólaheilsanin til starvsfólkið á landssjúkrahúsinum verið sparingar, og óvissa, flytingar og samanleggingar av deildum er enn dagligur kostur. Tað sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum, ið eins og sjúkrahússtjórin vil hava politikarar at gera sær greitt, hvat teir vilja við føroyska heilsuverkinum.**

SJÚKRAHÚSVERK
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Seinastu 14 árini hevur jólaheilsanini til starvsfólkið á landssjúkrahúsinum verið boð um sparingar, men nú ber ikki til at spara meira og renna enn skjótari , sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum*

*Tilvildarlig mynd*

Forkvinnan í felagnum hjá Føroyskum Sjúkrarøktarfrøðingum, fyrr Sjúkrasystrarfelag Føroya, harmast at tað heldur ikki í ár eydnaðist at fáa eina nøktandi játtan til landssjúkrahúsið.

Í leiðaranum í blaðnumVøka, sum er blaðið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, ið kom út um dagarnar, heitti Jana H. Dalsgaard enn einaferð á politikararnar um at vakna og taka støðuna í heilsuverkinum í álvara.

Men nú fíggjarlógin er endaliga samtykt, kann Jana H. Dalsgaard bara staðfesta, at heilsuverkið fekk at kalla somu jólaheilsan í ár sum seinastu 14 árini. Nevniliga boð um sparingar. Fleiri av undanfarnu árunum hava tøl verið sett á uppsagnir, og hvussu nógvar deildir skulu latast aftur, men hóast tað ikki hevur verið gjørt í ár, tala tølini og sparingarnar í fíggjarlógini til landssjúkrahúsið fyri seg. Forkvinnan í Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum sigur, at tað kom óvart á hana, at játtanin til landssjúkrahúsið eisini næsta ár er so lág, og at fíggjarnevndin harumframt valdi at skera 8,3 milliónir krónur av upprunaligu játtanini.



*– Vit høvdu væntað eina broyting, tá tíðirnar blivu betri eftir kreppuárini, men fyri heilsuverkið er kreppan ikki av enn, sigur Jana H. Dalsgaard*

– Líka síðan 1988 hava sparingar, niðurskurður, samanleggingar og stongdar deildir verið gerandiskostur á Landssjúkrahúsinum. Vit høvdu væntað eina broyting, tá tíðirnar blivu betri eftir kreppuárini, men fyri heilsuverkið er kreppan ikki av enn, sigur Jana H. Dalsgaard. Hon tók við sum álitisfólk á Landssjúkrahúsinum í 1988 og røkti starvið í fleiri ár.

– Fólk hava roynt at liva við sparingunum og at renna skjótari, men tað ber ikki til at halda fram á henda hátt. Skal meira sparast, so mugu funktiónir skerast burtur, men so mugu politikararnir eisini siga, hvat vit kunnu vera fyri uttan, leggur hon afturat.

Forkvinnan í Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum er sostatt samd við sjúkrahússtjóranum Poul Geert Hansen, tá hann í Sosialinum eftirlýsti eini politiskari ætlan við føroyska sjúkrahúsverkinum.

Í blaðnum hósdagin saknaði Poul Geert Hansen eina politiska støðutakan til, hvat støðið skal vera á landssjúkrahúsinum. Hann vísti á, at tá pengarnir ikki eru til staðar, so mugu politikararnir gera sær greitt, hvat teir kunnu liva við, og hvat borgararnir kunnu liva við, hvørt tað so eru færri tilboð ella longri bíðitíðir. Tí sum er eru fíggjarligu karmarnir so trongir, at ikki ber til at klípa burtur av her og har. Eisini vísti sjúkrahússtjórin á, at við verandi gongd fara seks milliónir krónir at mangla í til lønir næsta ár.

### Hvussu leingi afturat

Jana H. Dalsgaard vísir á, at starvsfólkið á landssjúkrahúsinum hevur verið ovbyrjað í nógv ár, og spurningurin er, hvussu leingi fleiri teirra orka ella tíma at halda fram á henda hátt.

- Í fleiri ár hevur verið trupult at fáa læknar til sjúkrahúsverkið, og sama gongd er at hóma við sjúkrarøktarfrøðingum. Hóast trupulleikin ikki er so akuttur millum okkara limir enn, so merkist hann longu, serliga um sumrarnar, sigur Jana H. Dalsgaard. Forkvinnan leggur afturat, at meðalaldurin hjá føroysku sjúkrarøktarfrøðingunum eru yvir 44 ár. Eftir hennara tykki hava sparingarnar tey nógvu síðstu árini bremsað menningini av landssjúkrahúsinum og gerast í longdini ómotiverandi fyri starvsfólkið, samtíðis sum krøvini til heilsuverkið gerast størri og størri.

– Eg eri bangin fyri, at starvsfólk fara at rýma av landssjúkrahúsinum, tí tey orka ikki at halda fram á henda hátt. Tey hava verið ovbyrjað við arbeiði í nógv ár, og spurningurin er, hvussu leingi tey orka at halda fram, spyr Jana H. Dalsgaard.

## Barsilsskipanin broytt

Í framtíðini verður barsilsgjaldið roknað eftir miðalinntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Tað hevur løgtingið endaliga samtykt. Higartil hevur gjaldið verið roknað eftir miðalinntøkuni teir bestu seks mánaðirnar seinasta árið.

Eisini er tíðin, foreldur kunnu vera í farloyvi, longd upp í eitt ár. Tó er longda farloyvistíðin uttan løn. Eftir lógini, ið kemur í gildi á nýggjárinum, hava foreldur rætt til barnsburðarfarloyvi við løn í 26 vikur. Mamman eigur einsamøll 14 vikur, og í hesum tíðarskeiði hevur pápin eisini rætt til tvær vikur í farloyvi. Foreldrini kunnu síðan sjálvi avgera, hvør teirra skal nýta tær írestandi 10 vikurnar. Eftir at foreldrini hava nýtt tær 26 vikurnar við løn, hava tey rætt til at vera í farloyvi frá sínum arbeiði í tilsamans 26 vikur afturat, tó uttan løn. Foreldrini gera sjálvi av, hvussu leingi hvør teirra er í farloyvi.

Broytingin í barsilsskipanini er mett at spara landskassanum umleið 10 milliónir krónur.

**jbh**

# Í gongd við rationaliseringar

**Tey trý sjúkrahúsini í landinum skulu samstarva í størri mun, so meira fæst burturúr. Eisini skal sjúkrahúsverkið sum heild gerast meira effektivt, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, sum eftir nýggjár fer at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða føroyska sjúkrahúsverkið**

SJÚKRAHÚS
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Vit noyðast í størri mun at síggja tað sum eitt sjúkrahúsverk, heldur enn trý ymisk sjúkrahús, sigur Bill Justinussen*

– Tað eru øki innan sjúkrahúsverkið, har tað ber til at skera niður og spara pengar, uttan at tað gongur út yvir høvuðsuppgávurnar hjá sjúkrahúsunum. Tað heldur Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum.

Við hesum sipar landsstýrismaðurin til, at sammett við okkara grannalond eru seingjardagatalið, tvs. tíðin fólk eru innløgd, ov høgt. Hann vísir á, at arbeiðast skal fram ímóti at styrkja tað ambulanta partin av sjúkrahúsverkinum, so fólk kunnu fáa eina skjóta viðgerð, og vera send fyrr heim aftur. Tá nýggi bygningurin á landssjúkrahúsinum verður tikin í nýtslu fer hetta at lætta munandi um arbeiðsgongdina.

Eisini er tað tyngjandi fyri raksturin av sjúkrahúsverkinum, at fleiri »liðugtviðgjørdir« sjúklingar ikki fara út aftur av sjúkrahúsinum. Bill Justinussen vísir á, at í meðal kostar eitt røktarheimspláss umleið 1100 krónur um dagin, meðan eitt seingjarpláss á landssjúkrahúsinum er tríggjar ferðir so dýrt. Trupulleikin í dag er bara, ongi pláss eru til teirra uttan á landssjúkrahúsinum.

### Samstarv

Bill Justinussen sigur, at hann eftir nýggjár fer at seta ein arbeiðsbólk, m.a. við umboðum frá øllum trimum sjúkrahúsunum í landinum. Bólkurin skal finna út av, hvussu til ber at útnytta sjúkrahúsverkini betri, so meira fæst fyri hvørja krónu.

– Tað kundi til dømis verið at ávísar funktiónir, sum í dag vera gjørdar á fleiri sjúkrahúsum, í framtíðini bara skulu gerast á einum sjúkrahúsi, sigur Bill Justinussen. Hann leggur afturat, at hetta verður ein av uppgávunum hjá arbeiðsbólkinum at kanna.

– Vit mugu vera sinnaði til nýhugsan og síggja tað sum eitt sjúkrahúsverk, og ikki trý sjúkrahús. Eg haldi eisini, at læknarnir á teimum trimum sjúkrahúsunum eru áhugaðir í hesi tankagongd, sigur Bill Justinussen.

### Meira innlit

Landsstýrismaðurin í heilsumálum sigur, at politikarar mugu fáa størri innlit í virksemið innan sjúkrahúsverkið. Tí fer hann, saman við fíggjarnevndini, í næstum at vitja tey trý sjúkrahúsini.

Bill Justinussen ásannar, at málið hevur skund, tí við verandi virksemi koma seks milliónir at mangla í til lønir næsta ár, bara á landssjúkrahúsinum.



# Heidi hevur yvirhálað Risan og Kellingina



*Heidi vann trý heiðursmerki í Argentina. Men bert tvey vóru við í kuffertinum av tí, at hitt varð stolið. Heidi fer at fáa tað sendandi við postinum um vónandi ikki so langa tíð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**– Fyri nøkrum árum síðani hildu vit á Eiði, at tað einasta onnur kundu seta í samband við bygdina var Risin og Kellingin. Men nú hevur Heidi yvirhálað Risan og Kellingina, og vit á Eiði er stolt av henni, segði Tordur Niclasen, borgarstjóri, á samkomu fyri Heidi Andreasen**

ÍTRÓTTUR
*Ingrid Bjarnastein*

Heidi Andreasen er júst afturkomin úr Argentina, har hon hevur luttikið í HM í Mar del Plata. Aftur hesa ferð kom hon heimaftur við medaljum í skjáttuni.

– Føroyar fingu trý heiðursmerki í teimum trimum kappingunum vit luttóku á, so tað ber ikki til at siga annað enn vit eru á heimsstøði, segði Jógvan Jensen, (Egga) formaður í ÍSB tá móttøka varð hildin fyri Heidi og venjaranum, Katrin Johansen.

Á borðinum frammanfyri tær báðar liggja tvey silvur heiðursmerki og skína. Bronsan er ikki goymd vekk, men nei. Hon var stolin.

– Tá vit vóru til seremoniina fingu vit heiðursmerkini um hálsin, og so vórðu vit noydd at taka tey av aftur, tí tey næstu skuldu hava tey. Eg fari at fáa bronsuna við postinum, sigur Heidi flennandi.

### Errin

Tá Føroyar gera vart við seg uttanlands, vaknar tjóðskaparkenslan í øllum. Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, var eisini hjástaddur og gav hann eisini Heidi nøkur orð við á leiðini.

– Heidi hevur enn einaferð avrikað stórverk. Vit eru stolt av henni á Eiði. Fyrr hildu vit, at tað einasta onnur kundu seta í samband við Eiðis bygd var Risin og Kellingin, men Heidi hevur yvirhálað tey, segði Tordur millum annað.

Heidi hevur annars seinastu mánaðarnar drigist við skaðar. Í januar mánað varð høgri fótur lagdur undir skurð, har hon síðani gekk við gipsi í tveir mánaðar. Í mars fekk vinstri fótur somu viðgerð.

– Sigurslønin kemur ikki av sær sjálvari. Heidi er ikki komin sovandi til úrslitið. Áhaldni, treiskni og vilji av stál hava verið amboðini.

Tordur Niclasen handaði aftaná røðuna eitt blómutyssi til Heidi og Katrin.

### Ovfarnar

Katrin Johansen, sum hevur seinastu nógvu árini verið venjari hjá Heidi, sigur, at hon heldur, at tær vóru realistiskar, tá tær frammanundan heimsmeistaraskapinum søgdu, at tær ikki høvdu nakrar serligar vónir til kappingina.

– Heidi hevur ikki kunnað vant sum áður, og tí er tað týdningarmikið at fáa fram, at vit hava ikki væntað tað heilt stóra, sigur Katrin Johansen.

– Tí vóru vit ógvuliga ovfarnar, at tað gekk so væl sum tað gekk.

Áðrenn sjálvt heimsmeistaraskapið var Heidi á eini venjingarlegu í Rio de Janeiro í Brasilia. Tveir dagar av venjingarleguni hevði hon trupulleikar við akslunum, og fekk tí ikki vant so væl.

– Vit hava havt samstarv við hini Norðanlondini, og tey hava verið ótrúliga stuðlandi. Tey rópaðu og heppaðu á Heidi, og onkuntíð róptu tey næstan meira á Heidi enn á síni egnu.

– Sjálv eri eg heilt ótrúliga væl nøgd, sigur Heidi sjálv. – Í 50 metrar frísvimjing setti eg persónligt met. Málið hjá okkum, mær og Katrin, var at satsa uppá at koma niður ímóti mínum bestu tíðum, so eg sjálv varð nøgd.

Heidi leggur afturat, at hon kann betra seg alla tíðina. Meira venjing, betri verður tað.

– Hugurin er enn eins góður. Eg havi eisini verið so heppin, at eg eri sloppin nógv út at ferðast og havi upplivað nógv. Tú bindur bond á henda hátt, og tú hittir fólki. Hetta heldur lív í huganum, og ger, at tú tímur væl. Tað er ikki stuttligt bara at venja og venja, og onki uppliva, sigur Heidi.

Næsta málið er Paraolympics í Athen í ár 2004. Onkrar kappingar verða næsta ár. Hetta er einamest fyri at sleppa við til Paraolympics, tí um tú ikki vísir teg, sleppur tú ikki at vera við

– Nú taki eg ein dag í senn, og finni útav tí so við og við, sigur Heidi at enda.



*Borgarstjórin á Eiði, Tordur Niclasen, vil vera við, at Heidi hevur yvirhálað Risan og kellingina í umtalu. Her handar Tordur, Heidi og Katrin, eitt blómutyssi frá Eiðis Bygdaráð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Úrslit frá HM kappingini í Mar del Plata í Argentina

**– her eru bert frá teimum kappingunum Heidi Andreasen luttók í**

100 m frísvimjing:
1. Keren Leybovitch, Ísrael **1.08,90 (heimsmet)**
2. Heidi Andreasen, Føroyar **1.11,98**
3. Pernille Thomsen, Holland **1.12,85**

200 m blandað svimjing
1. Dora Pasztory, Ungarn **2.58,82 (heimsmet)**
2.Cerasuolo Immacolata, Italia **3.05,21**
3. Andrea Cole, Canada **3.05,66**

6. Heidi Andreasen, Føroyar **3.08,38**

400 m frísvimjing
1. Keren Leybovitch, Ísrael **5.23,31**
2. Heidi Andreasen, Føroyar **5.24,41**
3. Chantal Boonacker, Holland **5.35,88**

50 m frísvimjing
1. Keren Leybovitch, Ísrael **31,91**
2. Pernille Thomsen, Holland **32,75**
3. Heidi Andreasen, Føroyar **32,88 (persónligt met)**